VB-B68 1-2 (1-1):

# B68 fekk fult í Vági

**VB hongur við høvdinum, og hesa ferð sótu teir eftir við ongum ímóti toftamonnum, sum vunnu fyri fyrstu ferð í fimm dystum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tað vóru tvey lið, sum ikki hava havt góða úrtøku seinastu vikurnar, sum tókust á Vágs eiði. VB Lagið í Vági er einki serligt. Fleiri spælarar venja eru misnøgdir við venjaran. Teir venja og spæla ikki, og onkrir sigast eftir summarsteðgin ætla sær at spæla við øðrum liðum í oynni. Tað hava teir ikki ráð til í Vági, har FM rákin frá í fyrraárið væl og virðiliga er horvin. Stóra íblásturin og skjóta og ágangandi spælið, sum plagar at eyðkenna VB á heimavølli var ikki á Vágs eiði hesa ferð.

Einki var at síggja til eitt nú Tórða Holm og Jón Paula Olsen og Gísli Sveinbjørnsson sat skaddur uttanfyri.

VB hevði bóltin nógv, men teir spældu seg ikki til nógvar møguleikar.

B68 hevur síðstu fjúrtan dagarnar spælt fimm dystir. Teir eru sendir úr steypakappingini, og teir hava spælt tvær ferðir javnleik á heimavølli í landskappingini og teir hava tapt stórt í Gundadali ímóti B36.

Tí hevði Frank Skytte broytt liðið á fleiri plássum undan ferðini til Vágs, og um mett verður út frá úrslitinum, so eydnaðist royndin til fulnar. Bogi Petersen, Oleif Joensen, Mannbjørn Nesá, Fríðin Ziskason og Marcello Marcellino vóru millum teir fystu ellivu.

VB kom á odda beinanvegin. Palli Augustinussen umsetti úr ellivu metrum, eftir at misskiljing millum B68 málverjan og Messias í miðverjuni hevði havt við sær, at málverjin gjørdi brotsspark ímóti Robert Cieslewicz.



*Øssur Hansen og Marek Vierzbicki í nærdysti. B68 vann torføra útidystin í Vági, har kreppan hjá heimaliðnum gjørst alt meira eyðsýnd*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Tvær ferðir Fróði

Í fjør varð Fróði Benjaminsen kosin at vera ársins spælari. Serliga eftir summarsteðgin var hann sera eyðsýndur, og hann skoraði eina rúgvu av málum. Í ár hevur tað ikki gingið so væl hjá Fróða. Hann hevur ikki havt sama leiklutin á miðvøllinum og onkra ferðina í álopinum, sum hann hevði í fjør, og hann hevur ikki skorað støðugt í landskappingini.

Men í Vági gekk væl hjá Fróða Benjaminsen, sum skoraði bæði B68 málini. Toftamenn vóru í 4–5–1 verjukendari útgávu, og saman við Øssuri Hansen var tað leikluturin hjá Fróða Benjaminsen ast stuðla Marcello, sum var einsamallur á toppinum.

Fyrra málið fingu toftamenn bara sjey minuttir eftir, at VB hevði sett hol á. Talan var um væl vanda frísparksstøðu dygst uttanvert brotsteigarmarkið. Marlon Jorge, Øssur Hansen og Fróði Benjaminsen stóðu hjá bóltinum. Fróði var tann fyrsti at fara eitt vet burtur, so leyp Marlon uppum bóltin, og í staðin fyri at smekka til potaði Øssur Hansen til Fróða Benjaminsen, ið var komin innum mannsterka verjugarðin og var púra leysur, tá hann sendi framvið Bjarna Johansen.

Tíðliga í 2. hálvleiki skoraði Fróði Benjaminsen sigursmálið. Marlon Jorge sendi úr høgru langan diagonalbólt. Fróði tamdi seg leysan og sendi framvið málverjanum og í handara síðunetið.

Dygst eftir leiðslumálið hjá B68 spældi Marcello Øssur Hansen púra leysan, men royndin hjá landsliðsmanninum fór væl omanfyri málið.

Síðstu løtuna trýsti VB, og B68 datt alt longur í verjustøðu. Tað kom illa við, at Hans Fróði Hansen noyddist at gevast. Tá varð B68 liðið umskipað, soleiðis at Jann Ingi Petersen kom inn á miðvøllin, og Fróði Benjaminsen yvirtók miðverjuplássið hjá Hans Fróða Hansen.

Tað eydnaðist B68 at halda tætt. VB skoraði fyrsta málið á heimavølli í ár, men teir eiga framvegis fyrsta heimasigurin til góða. Eftir tveir málleysar javnleikir mistu teir alt hesa ferð, og tað sær ikki gott út.

### Dysturin í tølum

**VB-B68 1-2 (1-1)**
1-0: Palli Augustinussen (br.), 7
1-1: Fróði Benjaminsen, 11
1-2: Fróði Benjaminsen, 49
Dómari: Suni Johansen

VB: Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Dan Djurhuus, Marek Wierzbiczki, Zlobodan Madzar, Mortan úr Hørg – Robert Cieslewicz, Nened Zinanovic
B68: Michal Kokoszanek – Oleif Joenen, Hans Fróði Hansen, Messias Perreira, Mannbjørn Nesá – Marlon Jorge, Fróði Benjaminsen, Bogi Petersen, Øssur Hansen, Fríðin Ziskason – Marcello Marcellino

# NSÍ sett leikandi samskipara



*Ian Højgaard, sum her sæst í dysti fyri NSÍ, er nú settur í starv sum samskipari hjá NSÍ*

**Ian Højgaard, sum annars spælir á miðvøllinum hjá NSÍ, er nú settur í starv sum samskipari hjá felagnum**

SAMSKIPARI
*Jákup Mørk*

Við ársbyrjan gjørdi NSÍ sum fyrsta føroyska fótbóltsfelag av at seta samskipara í lønt starv, og tó at royndartíðin hjá Áka Andreasen sum samskipara ikki varð longd, so hevur felagið á ongan hátt slept hesum ætlanum.

Mikudagin í farnu viku boðaði felagið nevnliga frá, at Ian Højgaard, sum annars eisini spælir á besta liði felagsins, nú er settur í starv sum samskipari hjá NSÍ.

Ábyrgdarøkið, sum Ian fær undir sær, eru fyrst og fremst at røkja alt samskifti hjá felagnum við lýsarar og samskipan av ymsum tiltøkum, umframt at hann eisini skal vera við til at mynda andlitið hjá felagnum úteftir.

KÍ-B71 1-1 (0-0):

# Mistu á stokkinum

**Sandoyingar mistu stig í evstu løtu, og nú tykist vónin um uppflyting at fjara heilt nógv hjá árstalsfelagnum**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Hóast B71 nakrar ferðirnar hevur verið í 2. deild, so hava steðgirnar her sjáldan verið drúgvir.

Tá liðið í 1988 vann uppflyting í bestu deildina fyri fyrstu ferð, hevði talan bert verið um tvey ára steðg í aðru deild, og bæðu í 1991 og 1998 steðgaðu teir bert tað eina árið, áðrenn leiðin aftur gekk upp í bestu deildina.

Hesaferð er tó líkt til, at talan í øllum førum verður um meira enn eitt ár í aðru deild. Leygardagin vitjaði B71 í Klaksvík, og í einum linligum dysti var leingi líkt til, at tað ikki skuldi eydnast nøkrum partinum at skora.

Stutt fyri leiklok eydnaðist tó Bergleif Sólsker, sum hevði dittað sær framvið, at senda í kassan, og so ráddi bara um hjá gestunum at halda fast.

Hetta eydnaðist teimum tó ikki. Tíðin mundi vera farin um teir 90 minutt-irnar, tá B71 framvegis var á odda, men so traðkaði Olgar Danielsen til sum ikki einaferð og tryggjaði KÍ annað stigið.

Stigið ber við sær, at klaksvíkingarnir framvegis halda fast um sessin miðskeðis í stigarøðini, har teir eisini framman fyri sandoyingarnar.

Og møguleikarnir at betra um hetta tykjast heldur ikki vera heilt lítlir. Í øllum førum átti KÍ at kunna fingið trý stig burturúr, tá VB kemur á vitjan komandi vikuskiftið.

B71 spælir tá móti LÍF, sum er á fjórða plássinum, og hetta má metas sum avgjørt seinasta útkall hjá sandoyingum, um teir skulu gera sær vónir um at spæla við í oddinum hetta kappingarárið.

**KÍ-B71 1-1(0-0)**
0-1: Bergleif Sólsker
1-1: Olgar Danielsen



NSÍ-TB 5-1 (3-0):

# Tað kundi ikki hilnast betur á stevnuni

**Spurningurin í Runavík var bara, hvussu stórur heimasigurin fór at verða ímóti tvørámonnum, sum einki høvdu at bjóða uppá**

NSÍ–TB
*Jóannes Hansen*

Ítróttarliga kundi Skálafjarðarstevnan ikki spæla betri av fyri vertirnar, enn hon gjørdi. Leygardagin vann Eysturoyingur kappróðurin (tað venda vit aftur til í blaðnum í morgin), og sunnudagin vann NSÍ stórsigur og varðveitti harvið trýstið á HB í kappingini um oddasessin.

TB tóktist hava givið skarvin yvir, áðrenn teir komu á vøllin. Teir royndu at flyta bóltin ímillum sín, uttan at teir kortini tóktust hava nakra álopsætlan, ella var tað heldur soleiðis, at teir ikki megnaðu at spæla seg úr verjustøðuni og fram á vøllin.

Fyri NSÍ hevur síðsta stóra vikan verið framúr. Eftir javnleikin í torføra útidystinum á Svangaskarði, fingu teir fult í Gundadali ímóti B36, so spældu teir seg í finaluna í steypakappingini, og á stevnuni vunnu teir stórsigur á TB.

Skal nakað telja á keðiligu síðuna hjá NSÍ, so má tað vera, at skaðalistin gjørdist eitt sindur longri aftur. Djóni N. Joensen var ikki við hesa ferð, Brynjolvur Nielsen fór tíðliga út av høgra vongverjanum, og Kári Hansen, sum fekk ein snudd seint í 1. hálvleiki, kom ikki á vøllin aftur eftir hvíldina.

Christian Høgni Jacobsen er í heimbygdini, har hann roynir at fáa dystarvenjing, áðrenn hann fer aftur til Vejle. Men tað gongst illa hjá landsliðsmanninum at sleppa upp í part í álopinum. Sonni L. Petersen og Óli Hansen hava skorað fleiri mál síðstu tíðina. Hóskvøldið var Christian Høgni vongverji í vinstru, og hesa ferð loysti hann Brynjolv Nielsen av sum vongverji í høgru.

### Málini

Fyrsta málið kom, tá tíggju minuttir vóru spældir. Christian Høgni Jacobsen sendi í stólpan aftanfyri Lars Müller, sum var besti TB spælarin og hevði fleiri góðar bjargingar, og Helgi L. Petersen var fyrstur á returinum, sum hann setti innaru síðuna undir.

Miðskeiðis í 1. hálvleiki økti Sonni L. Petersen við góðum skoti úr brotsteiginum, og minuttin aftaná var tað miðvallarin í høgru, Gert Langgaard, sum sendi úr brotsteiginum og í málið, eftir at hann hevði sneitt seg leysan.

Hóast NSÍ hevði stóra yvirvág og nógvar hálvar møguleikar og størri møguleikar enn tað, so bíðaði fjórða málið, inntil tað restaðu tjúgu minuttir. Sjúrður Jacobsen, sum eftir leikbannið í miðviku steypadystinum á Toftum, aftur var á vongverjanum í vinstru, legði innfyri, Sonni L. Petersen snittaði við høvdinum til eldra beiggjan, og Helgi takkaði fyri. Eftir at hann var farin framvið einum skoraði hann til 4–0.

Síðsta NSÍ málið átti Sjúrður Jacobsen. Hesa ferð var hann púra tryggur úr ellivu metrum.

TB slapp at pynta um í evstu løtu. Eftir hornasparksinnlegg úr høgru setti aftasti verjumaðurin Vladimir Matijivic fótin undir bóltin, sum fór inn um strikuna aftanfyri NSÍ liðformannin, Jens Martin Kndusen. Hann hevði annars verið mest sum arbeiðsleysur.



*Sjúrður Jacobsen átti seinasta málið hjá NSÍ, tá hann smekkaði brotsspark í netið. Samanumtikið var stórur munur á liðunum, og enn heldur NSÍ kósini í oddastríðnum*

### Dysturin í tølum:

**NSÍ-TB 5-1 (3-0)**
1-0: Helgi L. Petersen, 11
2-0: Sonni L. Petersen, 15
3-0: Gert Langgard, 26
4-0: Helgi L. Petersen, 70
5-0: Sjurður Jacobsen (br.), 87
5-1: Vladimir Matijivic, 90
Dómari: Birgir Sondum

NSÍ: Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Pól Thorsteinsson, Arnfinn Langgaard, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Kári Hansen, Helgi L. Petersen, Jónstein Petersen – Óli Hansen, Sonni L. Petersen
TB: Lars Müller – Einar Petersen, Tórður Mortensen, Vladimir Matijivic, Nebosja Urtajl, Rasmus Nolsøe – Jón Tórður Holm, Bárður Dimon, Olivur Abrahamsen – Allan Michelsen, Dan Mortensen

FS Vágar – B36 7-1 (5-0):

# Eingin ivi um vinnaran

**FS Vágar sendi B36 heimaftur við einum stórtapi, tá liðini hittust í landskappingardysti í Sandavági leygardagin. FS Vágar er nú heilt stóri favoritturin at flyta uppaftur í 1. deild**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

FS Vágar stevnir við beinari kós móti 1. deild, eftir at felagsliðið flutti niður í fjør. Liðið hevur verið sannførandi í teimum flestu dystunum, og leygardagin var tað B36, ið stóð fyri skotum.

Útiliðið fekk als ikki umrátt seg, tí FS Vágar legði út sum eitt óløgið. Longu eftir tíggju minuttir var støðan 3-0, og dysturin at kalla avgjørdur. Heimaliðið fekk tvey mál afturat seinni í fyrra hálvleiki og førdi heili 5-0 við steðgin.

Fyrsta málið fekk fyrrverandi B36-spælarin Bjarni Prior. Tað var Kim Poulsen, sum breyt ígjøgnum í høgru síðu, og hann sendi flatt innfyri til Bjarna, sum bara skuldi seta fótin á bóltin.

Í næsta álopinum skorar Jákup Joensen. Verjuleikararnir hjá B36 rudda ikki eitt innlegg úr vinstra borði burtur, og Jákup Joensen ger skjótt av og skorar við nærmastu stong.

Málið til 3-0 gjørdi Jens Erik Rasmussen. Aftur var tað Kim Poulsen, sum var upphavsmaður. Hann slapp at reka frá miðum vølli og heilt oman móti brotsteiginum, uttan at nakar fór ímóti honum. Hann prikaði bóltin inn til Jens Erik, sum var púra leysur og hann skoraði. Jens Erik átti eisini tað fjórða málið, sum hann skoraði uppá brotsspark, eftir at Jákup Joensen varð feldur í brotsteiginum.



*Vágamenn stevna beint móti bestu deildini. Leygardagin hølvaðu teir B63 av, og tað tykist ilt at finna nakað lið, sum kann steðga sigursrøðini hjá oddaliðnum*

*Mynd: Edvard Joensen*

Bjarni Prior fekk enn eitt mál, sum hann skeyt beint fyri steðgin. Hann fekk bóltin úti í borðinum, dró inneftir og langaði til við vinstra beinið, og bólturin sat dygst undir tvørstongini.

### Róligur seinni hálvleikur

Eftir steðgin vóru vágamenn ikki eins grammir sum í fyrra hálvleiki, og ferðin á dystinum fór nakað niður. Samstundis ressaðust gestirnir nakað. Teir vildu helst sleppa undan einum veruligum avsmurningi.

Ein góð løta gekk, áðrenn vágamenn øktu um leiðsluna, og hesuferð var tað Clayton Soares, sum slapp uppí part. Hann høvdaði eitt innlegg úr høgru í kassan, og so var tað 6-0.

Síðani var tað B36, sum átti tørn. Rógvi Róin á miðvøllinum hjá B36 lyfti bóltin uppum eina sovandi verju, og Heini í Skorini hevði ikki ilt við at senda bóltin framvið málverjanum til 6-1.

Tað var tó FS Vágar, sum átti síðsta orðið. Clayton Soares slapp aftur á máltalvuna. Hann leggur eitt høgt innlegg úr høgru hegnisliga niður og snýtir ein verjuleikara, áðrenn hann skorar úr stuttari fjarstøðu.

Vágamenn munnu vera nøgdir við hetta avrikið, og teir eru størstu favorittarnir at flyta uppaftur í bestu deildina, og liðið í ár er kanska betri enn tað frá í fjør.

**FS Vágar – B36 7-1 (5-0)**
1-0: Bjarni Prior
2-0: Jákup Joensen
3-0: Jens Erik Rasmussen
4-0: Jens Erik Rasmussen, br.
5-0: Bjarni Prior
6-0: Clayton Soares
6-1: Heini í Skorini
7-1: Clayton Soares